# Ráðstevna um arbeiðsmøguleikar

**Týsdagin 25. september verður ráðstevna í Norðurlandahúsinum um førleikar og arbeiðsmøguleikar hjá fólki, ið hava stutta ella onga útbúgving**

TÍÐINDASKRIV

Í einum framkomnum samfelag er stórur tørvur á útbúnum fólki og í samsvari við sjónarmiðið um lívlanga læring er neyðugt at virka fyri at styrkja kunnleika og førleikar hjá vaksnum. Hesir førleikar eru fortreytir fyri persónligari menning, og at fólk framhaldandi kunnu vera virkin í arbeiðslívi og taka lut í samfelagslívi sum heild. Kappingarførið í samfelagnum og hjá tí einstaka setur eisini alsamt størri krøv til útbúgving og førleikamenning, soleiðis at borgarin er førur fyri at dagføra sín kunnleika og ogna sær nýggja vitan.

## Dagføran av førleikum

Økið er fjølltáttað, um vit skulu hava eina fleksibla og mobila arbeiðsmegi og hava útbúgving og eftirútbúgving á ymsum stigum, soleiðis at tilboð eru til øll. Tað eru fleiri fólk, ið ikki hava nakra framhaldsútbúgving eftir loknan fólkaskúla, hvat kunnu vit gera fyri at bjóða teimum skeið og útbúgving? Skulu øll hava møguleika at menna sín førleika í mun til teirra fakliga støði og eftir egnum ynski? Hvussu kunnu fólk, ið hava lítla ella onga útbúgving ella eina gamla útbúgving, menna og dagføra sín førleika? Og hava øll tørv á at dagføra sín førleika?

Tað eru hesi viðurskifti, vit fara at viðgera og skifta orð um á ráðstevnuni saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, skúlum, ráðum og øðrum áhugaðum. Á ráðstevnuni verður eisini greitt frá, hvørjar møguleikar vit hava at luttaka í norðurlendskum verkætlanum um læring hjá vaksnum, og hvørjir stuðulsmøguleikar eru.

## Fyrilestrahaldarar úr Norðurlondum

Høvuðevnið á ráðstevnuni verður, hvørji útbúgvingarátøk vit eiga at seta í verk fyri fólk, ið ikki hava framhaldsútbúgving eftir loknan fólkaskúla ella sum hava eina eldri útbúgving, sum ikki nøktar fakliga tørvin í dagsins samfelag

Fyrilestrarhaldarar úr Noregi, Danmark og Íslandi fara at greiða frá, hvussu gjørt verður í hinum Norðurlondunum, og hvussu arbeiðið at útbúgva og endurútbúgva vaksna fólkið verður skipað. Vit hava uttan iva okkurt at læra av teirra royndum á økinum, sum vit kunnu nýta hetta í okkara arbeiði at taka støðu til, hvussu vit bøta um útbúgvingar- og eftirútbúgvingar møguleikarnar hjá okkum.



Á ráðstevnuni hevur tú møguleika at hitta fólk, ið hava drúgvar royndir á økinum viðvíkjandi vaksnamannalæring, og at fáa kunning og íblástur til at síggja avbjóðingarnar og møguleikarnar innan økið. Eisini fært tú í arbeiðsbókunum høvi til at viðgera evnið saman við øðrum, ið arbeiða við og vilja virka fyri, at øll hava møguleika at luttaka í fólkaupplýsing, útbúgving og eftirútbúgving. Soleiðis at vit kunnu menna fólkaræði og vónandi gerast dugnaligari borgarar í einum samfelag, sum alsamt tekur við nýggjum avbjóðingum og gevur øllum javnbjóðis menningarmøguleikar, eisini teimum, ið hava lítla ella onga útbúgving.

## Ókeypis luttøka

Mentamálaráðið skipar fyri ráðstevnuni í samstarvi við NVL, sum er norðurlendsk netverksskipan fyri vaksnamannalæring, Cirius, sum umsitur Nordplus skráirnar, Demos Føroyar og fakfeløgini á arbeiðsmarknaðinum. Málbólkurin er álitisfólk, nevndarlimir í fakfeløgum, arbeiðsgevarafeløg, skúlafólk og onnur, ið arbeiða við og hava áhuga fyri fólkaupplýsing. Ráðstevnan er ókeypis og verður 25. sept. kl. 09.30 – 16. 00 í Norðurlanda-húsinum. Áhugaði eiga at boða frá luttøku í seinasta lagi hósdagin 20. september hjá Gunnvør Eriksen, tlf 355050 ella í teldubrævi til gunnvore@mmr.fo.


ENDABRESTUR

nú allar útsøluvørur

- 70%

skógvar til alla familjuna

KALOS í RUNAVÍK
KALOS í TÓRSHAVN (Miðlon)
SKÓS í KLAKSVÍK



Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi ella líknandi til projekterings- og eftirlitsarbeiðið innan fyri rørtekniskar installatiónir.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði ella líknandi.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

Arbeitt verður við teldu forritum sum Word, Excel, MSProject, AutoCad/ABS og MagiCad.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og arbeiðsroyndir verður at senda okkum, innan 20. september 2007.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Jakobsen tlf. 353521/233521.

TEAM85

Pf. Sofus M. Jakobsen
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.

J.H. Schrøtersgøta 22, Postmoga 344, FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 353522 Fax (+298) 310622
t-postur: smj@smj.fo